Grindaformaður eitur
á týskum Jægermeister
**Maður, 48 ár**

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein

# Miðlamjarr



*Hetta er fyrstu ferð í 100 ár, at einki føroyskt skip sleppur at fiska í norskum sjógvi.*
Hanus Hansen, reiðari, nú eingin fiskiveiðisáttmáli er við norðmenn (Sosialurin)

Copy from one, it's plagiarism;
copy from two, it's research.
**Maður, 42 ár**

*Skalt tú fáa fasta almenna løn fyri tína yrkislist, so skalt tú eisini framleiða. Megnar tú ikki tað, so mást tú finna tær okkurt annað at gera.*
Carl Jóhan Jensen, rithøvundur (Dimma)



*Politikarar hugsa bara um, at teir skulu ikki traðka á hendan ella handan veljaran, og úrslitið er, at tú fært ongan reellan politikk.*
Sámal Petur í Grund, fyrrverandi politikari (Sosialurin)



Við LOVE
skal land
byggjast
**Kvinna, 41 ár**



Regn er
hugnaligt,
regn er
hugnaligt,
regn er
hugnaligt...
**Kvinna, 41 ár**



*Tað er eitt mark ímillum at virka bilig og stílfull. Eg eri á tí markinum.*
Poppstjørnan Katy Perry

*Allir tinglimir avgera sjálvir í mun til egna samvitsku, hvussu nógv ella lítið arbeiði teir leggja fyri dagin.*
Bill Justinussen, løgtingsmaður, um arbeiðstreytirnar í tinginum



*Mítt privatlív er perfekt. Um títt privata lívið er gott, so hevur tú tað eisini gott á vøllinum.*
David Beckham, enskur fótbóltsspælari